# Mýlingur komin upp á turt




*Hósdagin kom Mýlingur loksins upp á turt, og nú verður farið undir at skoða og meta um skaðan, ið skipið hevur fingið*

*Mynd: Bárður Lydersen*

**Fyrrapartin hósdagin kom Mýlingur upp á turt, og nú verður farið undir at meta um skaðan, ið skipið fekk mánamorgunin, tá ið grønlendski trolarin Salleq rendi á tað**

ÓHAPP
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Stutt fyri døgurða hósdagin kom trolarin Mýlingur loksins upp á turt. Tá ið skipið skuldi takast upp mánadagin, slitnaði veirurin á bedingsvogninum, og skipið fór aftur á sjógv. Bedingsvognurin endaði eisini á sjónum, og tí hevur verið neyðugt at fáa hann í lagi aftur, áðrenn Mýlingur kundi takast upp.

### Skoða nú skaðan

Fólk frá Tórshavnar Skipasmiðju hava síðani óhappið við bedingsvogninum mánadagin arbeitt við at fáa skift veirin á vogninum út, og tá ið hetta var gjørt, var vognurin royndarkoyrdur, áðrenn Mýlingur bleiv tikin upp.

Gunnar Mohr, skipasmiðjustjóri, sigur, at tað gekk væl at fáa Mýling upp á turt hósdagin, og nú verður farið undir at meta um skaðan.

- Nú fara fólk frá klassanum, tryggingini og reiðarið hjá Mýlingi, (P/F Kimbil blðm.) at kanna skaðan nærri, og vit skulu helst eisini gera ein meting av, hvat tað kemur at kosta at gera skaðan aftur, sigur Gunnar Mohr.

Tá ið hetta er gjørt, verður støða tikin til, hvat ið skal henda við skipinum. Tað hevur verið frammi, at Mýlingur, ið hevði ligið við bryggju í drúgva tíð, var við at blíva seldur spaniólum, og hesir møguligu keypararnir skuldu koma til Føroya síðst í hesi vikuni at hyggja nærri at skipinum.

Sum skilst er tað ógvuliga ivasamt, um sølan verður av nøkrum nú, og tað er eisini ivasamt, um tað kann loysa seg at umvæla skipið.

### Stórt hol á skrokkinum

Tá ið Mýlingur kom upp á turt hósdagin, sást, at skipið hevur fingið eitt stórt hol á skrokkin niðan fyri vatnlinjuna stýriborðsmegin, har kúlan á grønlendska trolaranum, Salleq, hevur rakt við Mýling.

Somuleiðis er lúnningin á Mýlingi stýriborðsmegin kroyst nakað inn, har gronin á Salleq hevur borið við.

Mýlingur er bygdur á tí fyri føroyingar so kendu Sterkodder skipasmiðjuni í Kristianssund í Noregi í 1972. Skipið er 459 bruttoregistartons, og hevur eina maskinorku upp á 1200 hestar.



*Mýlingur hevur fingið eitt stórt hol á skrokkin niðan fyri vatnlinjuna stýriborðsmegin, har kúlustevnið á Salleq bar við skipið*

*Mynd: Bárður Lydersen*

## Er hent áður

Í blaðnum mikudagin skrivaðu vit, at tá ið veirurin á bedingsvogninum hjá Tórshavnar Skipasmiðju slitnaði mánadagin, var tað fyrstu ferð í søguni hjá skipasmiðjuni, at hetta var komið fyri. Hetta hava vit síðani fingið at vita, er ikki heilt rætt.

Í 1969 kom eldur í Saturn, sum stóð uppi á beding á Skipasmiðjuni, og tá smeltaði veirurin á vogninum, sum fór á sjógv. Tíbetur vóru arbeiðsmenninir júst farnir í kaffisteðg, og hetta var ivaleyst høvuðsorsøkin til, at ongin fólkaskaði var í sambandi við hendingina.

**tn**

## Sjóforhoyr var hósdagin

Hósdagin var sjóforhoyr í málinum um, tá ið grønlendski trolarin Salleq rendi á Mýling og tveir smærri bátar, ið lógu við bryggju í Havn.

Við evstamark hjá blaðnum var sjóforhoyrið ikki liðugt, og tí ber ikki til hjá okkum enn at koma við nakrari niðurstøðu um, hvør orsøkin til óhappið var.

Vit fara tó í blaðnum í morgin at greiða nærri frá, hvat kom fram í sjóforhoyrinum í sambandi við óhappið á havnarvág 2. hvítusunnumorgun.

**tn**

## Krúnprinsessan verji hjá danska nýrafelagnum

Fyri góðari viku síðani varð almannakunngjørt, at hennara hátign Mary Krúnprinsessa hevur átikið sær lutin sum verji hjá danska nýrafelagnum.

Danska nýrafelagið, sum eitur Nyreforeningen, er eitt sjúklingafelag fyri kroniskt nýrasjúk, íroknað dialysusjúklingar og nýratransplantatión. Eisini er felagið stuðul hjá teimum, ið varða av sjúklingunum.

Tað verður mett, at umleið 5.000 danir eru nýrasjúkir. Í Føroyum hava vit eisini okkara egna Nýrafelag.

**tn**